## Hósdagur 4. oktober

**SVF**

18.30 Gloymdar leikur 8
18.40 Jumanji 24
19.05 Lítli maður frá fjallafonn 1:3
20.00 Dagur og Vika við Grannum okkara
20.50 Horvin 2:8 - donsk dokumentarsending
21.20 Ally McBeal - am. røð
22.05 Roomservice - íbúðin verður broytt
22.30 Krimitímin: Dalziel og Pascoe 1:2 - ensk krimirøð
23.25 Liðugt

**Eurosport.com**

7.30 Archery
8.30 Golf
9.30 Super Racing Weekend
10.00 Car Racing
10.30 Golf
11.00 Sailing
11.30 Beach Volley
12.30 Tennis
14.45 Xtreme Spoorts
15.45 News
16.00 Xtreme Spoorts
17.00 Football
17.30 Snooker
19.30 Boxing
21.30 Rally
22.00 News
22.15 Football
23.15 Cliff Diving
23.45 Rally
0.15 News
0.30 Close

**BBC PRIME**

0.05 TLZ: »American Visions – Streamlines and Breadlines«
1.00 TLZ: »Century of Flight – Man learns to fly 1900-1910«
2.00 TLZ: »Art – A Question of Style«
2.30 TLZ: »The Magic Flute
2.55 TLZ: »Maps – Under The Lens«
3.00 TLZ: »Following A Score«
3.25 TLZ: »The Science of Climate?«
3.55 TLZ: »Troubleshooter – Unfinished Business«
4.40 TLZ: »Landmarks – Tudors and Stewarts – Henry VII«
5.00 TLZ: »Japanese Language and People – Give and Take«
5.30 TLZ: »Teen English Zone«
5.55 Toucan Tecs: »Crazy Golf«
6.05 Playdays: »The Poppy Stop«
6.25 The Really Wild Show: »USA«
6.50 Celebrity Ready Steady Cook
7.20 Floyd's American Pie: »San Francisco«
7.50 Real Rooms
8.20 Going for a Song
8.50 Style Challenge: »Ozone Presenters«
9.15 Zoo
9.45 Vets In Practice: »A Steep Learning Curve
10.15 The Weakest Link
11.00 Dr. Who: »Planet of Fire«
11.30 Classic Eastenders
12.00 Eastenders
12.30 Hetty Wainthrop Investigates: »A High Profile«
13.25 Kitchen Invaders
13.55 Style Challenge: »Meals On Wheels«
14.25 Toucan Tecs: »Crazy Golf«
14.35 Playdays: »The Poppy Stop«
14.55 The Really Wild Show: »USA«
15.20 Totp Eurochart
15.50 Great Antiques Hunt: »Warwick«
16.20 Gardeners' World
16.50 Miss Marple: »The Moving Finger«
17.45 The Weakest Link
18.30 Cardiac Arrest: »Open and Shut«
19.00 Eastenders
19.30 Heartburn Hotel
20.00 Down To Earth: »Love In A Mist«
21.00 Big Train
21.30 Seeking Pleasure: »Holidays«
22.05 Muscle
22.35 TLZ: »QED – Spontaneous Combustion«
23.05 Out of Hours

**BBC WORLD**

0:00 BBC News
0:30 HARDtalk (r)
1:00 BBC News
1:30 Holiday (r)
2:00 BBC News
2:30 Reporters (r)
3:00 BBC News
3:30 Asia Today (r)
3:45 World Business Report (r)
4:00 BBC News
4:30 HARDtalk
5:00 BBC News
5:30 World Business Report
6:00 BBC News
6:30 World Business Report
7:00 BBC News
7:30 World Business Report
7:45 Sport Today
8:00 BBC News
8:30 Talking Movies (r)
9:00 BBC News
9:30 HARDtalk (r)
10:00 BBC News
10:30 Holiday (r)
11:00 BBC News
11:30 Simpson's World (r)
12:00 BBC News
12:30 HARDtalk (r)
13:00 BBC News
13:30 World Business Report
13:45 Sport Today
14:00 BBC News
14:30 Top Gear (r)
15:00 BBC News
15:30 Simpson's World (r)
16:00 BBC News
16:30 Asia Today
17:00 BBC News
17:15 World Business Report
17:30 Talking Movies (r)
18:00 BBC News
18:30 World Business Report
18:45 Sport Today
19:00 BBC News
19:30 HARDtalk (r)
20:00 BBC News
20:30 Click Online
21:00 BBC News
21:30 World Business Report
22:00 BBC News
22:30 Life
23:00 BBC News
23:30 World Business Report (r)
23:45 Asia Today

**3**

05:00 Børne-hjørnet med Disney
07:00 TV-shop
08:00 Panter-tanter(G)
08:25 Ricki Lake (G)
09:15 Ricki Lake
10:10 Horton-sagaen(G)
11:00 Horton-sagaen
11:50 Blossom(G)
12:20 Panter-tanter
12:50 Vild med dig
13:15 Pæn pige - sej sild
13:45 Baywatch Hawaii(G)
14:40 Blossom
15:10 Min kære familie
15:40 Baywatch Hawaii
16:35 Ricki Lake
17:30 Alle tiders barnepige
18:00 Felicity
19:00 Robinson - Talkshow
20:00 Floating Away
21:55 Brian vs Tyson: Før braget i Parken
22:00 Tve-kampen(G)
23:05 Vore værste år
23:35 Simpsons
00:05 Ricki Lake(G)
01:00 Drøm videre
01:30 Vore værste år (G)
02:00 Simpsons(G)
02:30 Sunset Beach

**ÚF**

03:15 Godnat
07.00 Tíðindi
07.05 Morgunlestur
Sverri Steinhólm, prestur lesur
07.15 Barnaløtan
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
07.30 Tíðindi
07.35 Góðan Morgun Føroyar
08.00 Tíðindi
08.03 Góðan Morgun Føroyar
09.00 Tíðindi
09.03 Sjónarringurin (e)
Árni Joensen leggur til rættis
09.35 Dagsins tónar
09.50 Morgunlestur (e)
Sverri Steinhólm, prestur lesur
10.00 Tíðindi
10.03 Fimleikaløtan 3
10.10 Tit skriva, vit spæla
Øssur Egholm skipar fyri
11.00 Tíðindi
11.03 Á sanganna veingjum (e)
Gunnvør Poulsen leggur til rættis
12.00 Veðurtíðindi
12.02 Middagstónleikur
12.15 Skráin og lýsingar
12.20 Tíðindini
12.40 Døgurðatónar
13.00 Tónatímin
14.00 Fimmarin (e)
15.00 Tíðindi
15.03 Nýtt og gott gamalt
Tróndur Vatnhamar velur løgini
16.00 Tíðindi
16.03 Brotamyndir
Annlis Bjarkhamar leggur til rættis
17.00 Tíðindi
17.05 Í víngarðinum
Victor Carlsen leggur til rættis
18.00 Barnaløtan (e)
Jonna Olsen og Kári Sólstein leggja til rættis
18.25 Skráin og lýsingar
18.30 Tíðindini

## Tilvera: Munur á kynunum

**ÚF Hóskvøldið kl. 19.00**

Sendingin er ein samrøða við fólkalívsfrøðingin Eyðun Andreassen.

Fyri árum síðani kendu maður og kona sín leiklut. Maðurin breyðføddi konu og børn. Hann var í bjørgunum og á havinum. Kvinnan hevði sítt arbeiði inni við eldin, men eisini uttanfyri. Hvørgin kundi vera annan fyriuttan.

Í dag eru flest allar kvinnur farnar á arbeiðsmarknaðin, og brádliga hava kvinnurnar fleiri størv. Leiklutur-in hjá manninum er eisini broyttur, tí nú mugu bæði kynini samstarva á heilt øðrvísi hátt, skal alt ganga upp.

*Men er hetta gongda leiðin?*

## Lítli maður frá fjallafon 1:3 (e)

**SVF Hóskvøldið kl. 19.05**

Sjónvarpið fer nú undir eina sendirøð í trimum pørtum um skalidð Hans Andreas Djurhuus. Hetta eru dokumentarsendingar, sum lýsa mannin og samtíð hansara. Hans Andreas vaks upp, tá slupptíðin fór at gera um seg, og mangar av sjómansrímunum eru sprotnar úr hesi tíðini. Tann ungi havnardrongurin var ikki sørt av einum droymara - øll skipini, sum vitjaðu Havnina settu ferð á hugflogið. Hetta var eisini ein trupul tíð, tann ungi drongurin lærdi eisini tíðliga at kenna sorgina. Í hesu fyrstu sendingini fylgja vit tí vaksandi yrkjarahuganum hjá Hans Andreasi. Ein gongd, sum tók dik á seg, tá hann fór á háskúlan í Føgrulíð. Tað er Hanus Kamban, sum hevur gjørt tær 3 sendingarnar um yrkjaran, sum helst man vera Føroya fólkakærasta skald.

*Skrivað og lagt til rættis: Hanus Kamban.*

## Robinson - Talkshow (4)

*- Talkshow*




Robinson Talkshow er tann sendingin, har luttakararnir, sum eru sendir út úr kappingini aftur trína fram á skíggjan. Fyrrverandi luttakararnir verða spurdir um alt viðvíkjandi Robinson; Hvussu tað er at gerast kendur, hvussu tað er úti á oynni. Eisini vitja luttakarar frá árunum frammanundan.

19.00 Tilvera: Munur á kynunum
Armgarð Arge leggur til rættis
19.30 Crescendo
Kári Olsen stílar fyri
20.30 Hvussu við mær?
Framhaldssøga eftir Colby Radowsky. Knút Olsen týddi. Katarina Nolsøe lesur. 10. partur
21.00 Tíðindi
21.10 Dagsetur
Øssur Egholm er vertur
22.00 Ljóðmúrurin
Bjarni Mohr leggur til rættis.
23.00 Tíðindi

**Rás 2**

09:45 Orðið
Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10:00 Leysaløtan (e)
11:00 Hálvtímin (e)
12:00 Tíðindi og kunngerðir
12:15 Tónleikur
13:00 Ynskiløtan
Send heilsur via (www.ras2.fo) ella á fax. 359990.
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan (framhald)
15:00 Tíðindi og kunngerðir
15:10 Leysaløtan
16:00 Tónleikur
17:00 Norðlýsið
Aktuell sending úr Studio 7 í Klaksvík
John William og Oliver Joensen leggja til rættis
18:00 Tíðindi og kunngerðir
18:10 Tónleikurónleikur
19:00 Orð á leiðini
EvR sending
19:40 Tónleikur
21:00 Tíðindi og kunngerðir
21:15 Orðið (e)
Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21:30 Girlzone
Undirhaldssending fyri ung, Súsanna Clementsen og Ruth Reinert skipa fyri. Telefon: 35 99 93 Fax: 35 99 90 E-mail: girlzone@ras2.fo
00:00 Liðugt

13.00 Byrjan – Dagsskráin verður lisin
13.15 Okkara dagliga breyð
13.30 Sjómanssendingin Vitin v/ M.C. Restorff (e)
14.30 Tónleikur fyri børn
15.00 Tónleikur
18.00 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti
19.00 Brot og bitar ein ørvísi tíðindasending.
19.15 "The finishing touch" v/ Alex O'Campo
20.30 Okkara dagliga breyð
20.40 Lýsingar fyri møtir ið verða í vikuskiftinum.
20.55 Dagsins Orð eftir Svenning av lofti (e)
21.00 Bønarlinjan, beinleiðis sending við gesti vertur er Jenis av Rana
Bønarevni kunnu ringjast inn frá kl. 20.00. Tlf. 321377 og til ber at senda fax á nr. 321379.
Vit gevast uml. middnátt



# Suðuroyingur fingið takkarløn

**Lions Klubburin í Suðuroy hevur heiðrað Virgar Djurhuus á Tvøroyri fyri hansara ótróttiliga sosiala arbeiði, ikki minst ímillum ungdómin, á Tvøroyri í næstan 20 ár**

TAKKARLØN
*Áki Bertholdsen*

Lions Klubburin í Suðuroy samtykti í vár at fara undir eitt nýtt tiltak. Tað var at vísa onkrum suðuroyingi, sum hevur gjørt eitt serligt avrik av onkrum slag, eina lítla viðurkenning.

Onkur hevur kallað hetta eina heiðursløn til ársins suðuroying. Sjálvur kallar Lions Klubburin hetta eina takkarløn til ein suðuroying, sum hevur útint serligt avrik á onkrum øki.

Herfyri samtykti klubburin so at fyrsta heiðursteknið skuldi Virgar Djurhuus á Tvøroyri fáa.

– Vit síggja viðhvørt – um enn at tað er sjálvdan – at tað eru fólk, sum offrað seg heilt og fult fyri eini sak, og tað ólønt afturat. Men enn sjáldsamari síggja vit, at hesi fólkini fáa ta tøkk og viðurkenning, tey hava uppiborið segði Leivur Nygaard, Lions forseti í Suðuroy, tá ið hann handaði Virgari Djurhuus heiðursgávuna.

Heiðursgávan var ein sera snotilig veggjaklokka úr føroyskum gróti við Lions búmerkinum í. Við gávuni fylgdi eisini eitt heiðursbræv.



*Leivur Nygaard, Lions forseti í Suðuroy, vinstrumegin, handar Virgari Djurhuus á Tvøroyri tað fyrstu takkarlønina hjá Lions Klubbanum í Suðuroy fyri hansara ótroyttiliga, sjálvbodna, sosiala arbeiði á Tvøroyri, ikki minst ímillum ungdómin*

### Tikin á bóli

Sjálvur varð Virgar Djurhuus fullkomiliga tikin á bóli. Hann visti av ongum, men varð boðsendur oman í ítróttarhøllina á Tvøroyri týskvøldið á flogbóltsfund.

Fundur var so ongin, men ístaðin fekk hann heiðursgávu fyri hansara ótroyttiliga sosiala arbeiði á Tvøroyri.

Tað er nevniliga Virgar Djurhuus, sum hevur hevur verið undangongumaður í flogbóltin á Tvøroyri, heilt síðani hann tók seg upp fyri næstan 20 árum síðani.

Tey, sum hava við flogbólt á Tvøroyri at gera, siga, at hann hevur verið hjartað og sálin í flogbóltinum á Tvøroyri, síðani hann byrjaði, og uttan at taka nakað frá øllum hinum, er tað fyrst og fremst Virgari Djurhuus fyri at takka, at flogbóltsfelagið á Tvøroyri nú er ímillum tey allarfremstu í landinum.

Tá ið hann fór undir flogbóltin á Tvøroyri í 1983 var onki lið, men hann byrjaði í smáum við at spæla flogbólt við gentum úr 9. og 10. flokki. Drongirnir vístu ikki sama áhugað og tað er ikki, fyrrenn nú tey allarseinastu árini, at teir eru við at koma meiri upp í.

Síðani hevur flogbólturin á Tvøroyri ment seg við lít, so at tað nú eru tilsamans 150 virknir leikarar í flogbóltsfelagnum á Tvøroyri. Felagið hevur í løtuni ikki færri enn 21 ungdómslið, umframt lið í meistaradeildini fyri kvinnur.

– Vit eru mong íð hava fylgt við, hvussu tú, við hjálp frá góðum kreftum, hevur bygt flogbóltin á Tvøroyri upp frá ongum til tað, hann er í dag. Hetta hevur kostað tær at kalla hvørja fríløtu hvønn einasta vetur, bæði til venjingar, skeið og ferðir norðureftir.

– Hetta er eitt arbeiði, sum hevur so ómetaligan týdning fyri ungdómin, at tað kann ikki gerast upp í pengum. Men tað ætla vit heldur ikki, segði Leivur Nygaard, tá ið hann handaði Virgari klokkuna og heiðursbrævið.

Samstundis, sum Lions Klubburin læt Virgari heiðursgávu, nýtti flogbóltsfelagið eisini høvi til at heiðrað hann við eini gávu og einum lítlum kekki fyri væl útint arbeiði.

# Ætla at bjóða av í kappingini um at hava tann tyngsta veðrin

**Í morgin verður veðrasýning í Hvalba. Í seks ár á rað hevur sami maður vunnið kappingina um at eiga tyngsta veðrin, men nú eru tað onkrir, ið ætla at bjóða av**

VEÐRASÝNING
*Áki Bertholdsen*

Í morgin verður árliga veðrasýningin í Hvalba. Hon verður í túninum omanfyri Roynhøllina og ætlanin er at byrja kl. 16.30.

Tað er beint aftaná avgerandi fótbóltskampin ímillum næstfremsta liðið í 3. deild, Royn, og næstaftasta liðið í 2. deild, KÍ, um rættin til at spæla í 2. deild komandi kappingarár.

Kampurin í Hvalba í dag er tann fyrri av tveimum dystum, sum skal vera ímillum hesi bæði liðini um rættin at spæla í 2. deild komandi ár. Seinni dysturin verður í Klaksvík næsta leygardag.



*– Tað verður spennandi at vita, hvør hevur tann tyngsta veðrin í ár, tí tað ljóðar, at menn hava gjørt seg út at forða fyri, at Hermundur Hentze skal vinna steypið sjeyndu ferð á rað*

Í sambandi við fótbóltin og veðrasýningin verða ymisk tiltøk í Roynhøllini, eitt nú mat- og kakutombola, burturluting, umframt at tað ber til at keypa kaffi, te og okkurt afturvið.

Tað eru nú nøkur ár síðani, at Eliesar Poulsen og aðrir tóku stig til at hava veðrasýning í Hvalba.

Kappingin í morgin er fyri veðrar, veturgamlar og eldri.

Seinni verður eisini sýning í Hvalba fyri brundlomb.

### Allir fáa steyp

Eliesar Poulsen sigur, at fleiri steyp verða latin í kappingini.

Veðrarnir verða býttir í tveir bólkar, teir veturgomlu fyri seg og tey eldru fyri seg. Nummar eitt, tvey og trý í hvørjum bólki fáa steyp.

Dómararnir í kappingini eru enn sum áður, Petur Karl av Rana og Ásmundur Bærentsen av Tvøroyri. Óli í Hjøllum úr Porkeri og Frits Poulsen úr Sumba og tað vera teir vakrastu veðrarnir í hvørjum bólki, sum fáa steyp.

Steypini hava Suðuroyar Ullvirki í Vági, Bakkhús í Hvalba, Føroya Sparikassi og Sosialurin latið.

Eliesar Poulsen sigur, at seinni í heyst verða sýningar í øðrum bygdum í Suðuroy eisini og at enda er so ætlanin at hava eina oyggjarsýning, har teir vakrastu veðrarnir frá øllum sýningunum vera við.

### Vunnið øll árini

Hesi seinastu árini er eisini eitt serligt steyp latið til tann tyngsta veðrin. Hetta steypið er nú latið í seks ár og hvørja ferð er tað sami maður, Hermund Hentze, sum hevur vunnið. Í fjør vigaði tyngstu veðrurin hjá honum 95 kilo.

Men Eliesar Poulsen sigur, at í ár eru tað fleiri, sum ætlað, at Hermund skal ikki vinna steypið sjeynda árið á rað.

– Tað ljóðar, at menn hava gjørt seg út at taka kappingina og ætla at bjóða Hermundi av í kappingini um tann tyngsta veðrin. Teir hava gjørt serliga væl við onkran veðr í ár, so tað verður spennandi at vita, hvør fær steypið í ár sigur Eliesar Poulsen.